**Fundarfrásøgn**

| | |
|---|---|
| Heiti: | Leiðslufundur |
| Sendast til: | Sigurð í Jákupsstovu (SíJ), Jørgen Meitilberg (JM), Malan Marnersdóttir (MM) og Hans Pauli Joensen (HPJ), Randi Frederiksberg (RD) |
| Til staðar á fundinum vóru: | SíJ, JM, HPJ og RD |
| Skrivað hevur: | JM |
| Fundartíð: | Týsdagur, 23. september 2014 |
| Fundarstað: | SSS |

Mál til støðutakan:

- Einki mál innkomið.

Mál til umrøðu:

- Hvussu skal annað árið á MA í vegleiðing fíggjast. Fróðskaparsetrið má seta seg í samband við Mentamálaráðið, tí útbúgvingin verður partvíst fíggjað av játtanini til eftirútbúgving av lærarum, sum Mentamálaráðið varðar av. Kostnaðurin av útbúgvingini higartil skal útgreinast.

Kunningarmál:

- RD er farin í gongd við at útgreina uppgávur og gera eina ætlan fyri at stovnsetanini av Lestrarskrivstovuni. Ætlanin er at lýsa uttanhýsis eftir skrivara til lestrarskrivstovuna í skjótast gjørligt.
- Próvbókin verður eftirmett í næstum. Fyrsta stigi er at útgreina tørvin. Ein stýrisbólkur verður settur at stýra arbeiðinum, meðan ein arbeiðsbólkur, mannaður við viðkomandi pørtum, verður settur at kortleggja tørvin og gera tilmæli.
- Skipað verður fyri skeiði í Outlook í næstum.

Ymiskt:

- Til næsta leiðslufund:
    1. Freist ásetast fyri nær skeiðslýsingar í seinasta lagi skulu latast inn.
    2. Umrøða av skránni til komandi stýrisfund, sum verður 19. november 2014.